## Hava flett 173

Á Kirkjubøgarðinum hava tey higartil flett 130 veðurlomb og veðrar innan av landi umframt 40 lomb, tvær ær og ein veðr úr Trøllhøvda. Jóannes Patursson, bóndi, sigur, at tað hevur gingið hampiliga væl at selja kjøtið, og øll veðurlambs- og veðrakrovini eru seld. Tey hava 200 gimburlomb eftir at fletta, og tey verða ætlandi flett um einar fjúrtan dagar. Umleið helvtin av tí fer til Roykstovuna og tiltøk har, og hitt verður selt.

## Konsert í Gøtu



Fríggjakvøldið klokkan 20 hevur norska trioin Poing áhugaverda konsert í Gøtu kirkju. Teir tríggir, sum manna trioina, spæla saxofon, harmonica og kontrabass, og teir spæla fyri tað mesta nýggjan tónleik frá klassiskum tónleiki til fólkatónleik og rock. Poing hava millum annað arbeitt saman við Dubliners og Arlo Guthri úr Runrig, eins og teir hava arbeitt við etniskum tónleiki úr fleiri londum. Konsertin í Gøtu kirkju er ókeypis.

# Einskiljing setir fót fyri útróðurin í Sandoy

**- Útróðurin á Sandi hevur tað ikki gott eftir at Farmaleiðir vórðu einskildar**

ÚTRÓÐUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Síðani Farmaleiðir vórðu einskildar, eru útróðrarmenn á á Sandi púra avskornir frá at fáa fisk á uppboðssøluna*

- Tað er næstan hopleyst hjá okkum at sleppa av við fiskin.

Útróðrarmenn í Sandoynni eru ikki ímillum tey, sum hálova einskiljingini av Farmaleiðum hjá Strandferðsluni.

Síðani Farmaleiðir vórðu einskildar til privat feløg at reka, hevur tað gjørt umstøðurnar hjá útróðrarflotanum í Sandoynni so vánaligar, at tað er ikki til at liva við.

Tað er serliga flutningurin av fiski av Sandoy á uppboðssøluna, sum voldir teimum trupulleikar.

- Tað vísir seg sum um at felagið, sum nú hevur yvirtikið flutningin hjá Farmaleiðum, hevur yvirhøvur ikki stundir til at fáast við at flyta útróðrarfiskin, sigur Ragnar Fossdalsá, útróðrarmaður á Sandi.

Hann hevur sjálvur ein 28 fót bát av glastrevjum, sum eitur Katrin.

Og hann hevur róð út í mong ár so hann hevur nakað at samanbera við.

- Fyrr plagdu vit at boða Strandferðsluni frá nær vit kundu væntast at vera inni at avreiða, so komu Farmaleiðir eftir fiskinum og fluttu hann á uppboðssøluna dagin eftir. So tað var sera góð tænasta

Men nú er hopleyst at brúka Strandferðsluna og felagið, sum yvirtók Farmaleiðir, tí tað tekur mangan einar tríggjar, fýra dagar at fáa útróðrarfiskin úr Sandoy og norður á uppboðssøluna.

Hann sigur, at felagið, sum yvirtók flutningin hjá Farmaleiðum, ikki klárar at taka sær av útróðrarfiskinum.

- Flutningsfelagið er ofta í Sandoynni eftir fiski frá flakavirkjunum, men tá er javnan ikki pláss fyri útróðrarfiskinum. So lova teir at taka hann dagin eftir, men tá er mangan heldur ikki pláss. Og soleiðis kann tað taka fleiri dagar at fáa fiskin norður á uppboðssøluna.

- Skulu vit brúka Strandferðsluna nú, verður fiskurin bara fluttur til Havnar og so mugu vit sjálvir syrgja fyri flutninginum inn á Toftir.

### Munandi dýrari

Ragnar Fossdalsá sigur, at hetta hevur eisini gjørt flutningin nógv dýrari.

- Fyrr kostaði tað 78 krónur at fáa ein kassa heilt inn á Toftir við Strandferðsluni. Nú kostar tað tvær ferðir so nógv.

Hin møguleikin er at bátarnir sjálvir sigla inn á Toftir ella vestur í Vágar, men so rýkur tað mesta av einum degi í berari sigling, umframt at tað er dýrt í brennievni.

- Og tað heldur ikki altíð líkindi at fara, tí bátarnir eru smáir.

At tað er so tvørligt hjá teimum at sleppa á uppboðssøluna, kemur serstakliga illa við hjá teimum.

- Tveir triðingar av tí, bátarnir fáa, er hýsa og virkini í oynni keypa ikki hýsu, sigur útróðrarmaðurin á Sandi.

Annars fiska teir mest við snellu, men nú kemur skjótt tann tíðin, at vit mugu við línuni, tí vit plaga at byrja seinni í hesum mánaðinum.

- Tí er hetta ein stórur meinbogi hjá útróðrarmonnunum í oynni, leggur hann afturat.

Útróðrarmaðurin á Sandi sigur, at hetta eru ikki umstøður, sum útróðrarflotin í Sandoynni kann liva við.

- Sum støðan er nú, er tað púra avskorið at sleppa á uppboðssøluna.

Hann sigur, at teir hava hugsað um eina loysn, har fiskurin kann pakkast á virkjunum á Sandoynni, men at hann so verður seldur á uppboðssøluni.

- Enn vita vit ikki um tað ber til, men so mugu keyparar sjálvir syrgja fyri flutninginum úr Oynni.

- Men landsstýrismaðurin í innlendismálum hevur eisini játtað at koma á fund við okkum í eini roynd at fáa eina loysn og tað kann væl vera, at vit taka av.

Sandoyggin er annars eitt stórt útróðrarplass, tí har eru einir 25 útróðrarbátar. Tað er ikki nógv at fáa nú, eini fýra til átta sentnarar um dagin við snelluni.

## Frá Javnaðarflokkinum

Mint verður á landsfundin, ið verður í bygdahúsinum í Miðvági. Fundurin byrjar fríggjakvøldið kl. 19.30 og heldur fram leygarmorgunin kl. 9.00.

***Skrá fyri fundin:***

**Fríggjadagin 20. okt. 2006**

kl. 19.30 Fundurin verður settur
Skrivarafrágreiðing
Frágreiðing frá limafeløgunum
Tónleikur

**Leygardagin 21. okt. 2006**

kl. 9.00 Morgunmatur
kl. 9.30 Formansfrágreiðing
Kjak um formansfrágreiðingina
kl. 13.30 Gestarøðari
Tema orðaskifti
kl. 17.30 Matlig hugnaløta

***Møti fjølment***

**Javnaðarflokkurin**